# Faxe umhugsar sína støðu

*Síðstu dagarnar hevur nógv verið skrivað og tosað um aldubrotini í felagnum hjá Jákupi Mikkelsen*

Hesar seinastu vikurnar hevur Herfølge so at siga hvønn dag verið á skránni í donsku pressuni. Tað hevur verið nógv sagt og skrivað um, at teir lótu tveir spælarar fara til AB, og í síðstu viku vistu donsku fjølmiðlarnir at siga, at tað hevði verið kreppufundur í felagnum. Fíggjarliga stendur ikki serliga væl til, og nú er komið fram, at pengamenn uttanfyri felagið hava havt hálsrætt yvir fleiri spælarum. Nú er hetta broytt. Nýggir pengar eru lagdir í felagið, og nú verður sagt, at viðurskiftini eru komin upp á pláss.

Ein av stóru spurningunum í felagnum hevur tær seinastu vikurnar verið, hvussu tað verður við venjaranum. Sáttmálin millum John Faxe Jensen og Herfølge er galdandi til endan á hesum kappingarárinum.

Í síðstu viku ljóðaði, at tað var rættuliga sannlíkt, at nýggjur sáttmáli fór at verða undirskrivaður innanfyri einar fjúrtan dagar. Tað varð sagt, at sáttmálin m. a. fór at hava við sær, at Faxe komandi ár bara skuldi venja og ikki skuldi spæla. Venjarin segði sjálvur, at hann avgjørt var áhugaður í at halda fram í felagnum, um lønin og umstøðurnar annars vóru nóg góðar. Umstøðurnar annars sipaðu til tíðindini um, at tað hevur verið nevnt, at venjarin var ikki nóg væl kunnaður, tá tveir spælarar, Steven Lustü og Jesper Falck, vórðu seldir til AB, og tá ein spælari, Jens Madsen, varð seldur til Grikkalands, tá farið varð undir nýggja kappingarárið. Í Herfølge hildu teir seg hava gjørt eina nýggja avtalu við miðvallaran, men sáttmálin var ikki undirskrivaður, og so fleyg frælsi fuglurin.

Eftir vikuskiftið hevur pípan hjá venjaranum fingið annað ljóð. Nú verður sagt, at tað er góður møguleiki fyri, at John Faxe Jensen ikki verður í Herfølge komandi kappingarár. Tað kann hugsast, at talan er um samráðingartaktikk, men tað er ein veruleiki, at venjarin hevur sagt, at hann hevur tilboð og følarar bæði úr øðrum feløgum í Danmark og frá útlendskum feløgum.

– Avgerðin um framtíðina verður tikin í desember, sigur John Faxe Jensen.

**jh**



*John Faxe Jensen tykist nú vera farin í bíðistøðu, har hann umhugsar, hvørt hann skal halda fram sum venjari hjá Herfølge ella ikki*

# Sogndal skal spæla um pláss í bestu deildini

*Bara ein føroyingur var á liðnum, tá tað endaliga varð greitt, at Sogndal skal luttaka í endaspæli um eitt pláss í bestu deildini*

Í Noregi gera teir, sum tað verður gjørt í Føroyum. Kappingarárið í fótbólti er tað sama sum álmanakkaárið. Komandi sunnudag er 26. og síðsta umfarið á skránni í bestu og næstbestu deildini. Sunnudagin varð greitt, at vinarbýurin hjá Klaksvíkini, Tróndheim, aftur í ár eigur besta fótbóltsliðið í Noregi. Rosenborg, sum við sínum avrikum í Europa Cup tey seinastu árini hevur staðfest, at teir eru besta fótbóltsliðið í Norðurlondum, vann 9-0 á Bryne. Harvið varð tað púra greitt, at Rosenborg aftur í ár er norskur meistari.

## Nýggj avbjóðing

Í næstbestu deildini snýr føroyski áhugin seg um, hvussu tað gongst hjá Sogndal. Sunnudagin var føroyska liðið á útivølli ímóti Raufoss. Sogndal var undan 25. umfarinum á triðja plássi, og Raufoss var á fjórða plássi.

Dysturin varð spældur innandura í tí, teir kalla Hydrohallen. Talan er um eitt plasttelt, sum verður hildið uppi av lufttrýstinum. Tað var vakurt heystarveður í Noregi sunnudagin, men grasvøllurin í Raufoss var so mikið vánaligur, at tað varð ikki hildið ráðiligt at spæla á honum.

Sogndal vann 2-0, og harvið er tað púra greitt, at føroyingarnir skulu halda fram at kappast, eftir at flestu fótbóltsspælararnir í Noregi hava spælt síðsta landskappingardystin.

Sogndal skal sunnudagin spæla á heimavølli ímóti Kjelsås. Tá verður talan ivaleyst um fagna á heimavølli yvir góða avrikið í ár. Mikudagin í komandi viku og annan sunnudag verður endaliga avgjørt, um Sogndal komandi ár skal spæla í bestu deildini, tippuliguni, ella um teir skulu halda fram í 1. deild.

Tað er ikki endaliga greitt, hvørjum Sogndal skal kappast ímóti um plássið í bestu deildini. Haugesund er niðast í tippuliguni. Teir hava 16 stig og eru fluttir niður. Hitt beinleiðis niðurflytingarplássið fer til Vålerenga ella Start. Bæði liðini hava 21 stig. Tað liðið av hesum báðum, sum sleppur undan beinleiðis niðurflyting, skal helst spæla ímóti Sogndal, men tað er eisini ein lítil møguleiki fyri, at tað verður Bryne, sum hevur 24 stig.

## Dysturin

Leygardagin søgdu vit, at allir føroyingarnir skuldu við Sogndal til Raufoss. Heimasíðan hjá felagnum var ikki dagførd undan evsta markinum hjá okkum. Seinni fríggjadagin vistu teir at siga, at Kurt Mørkøre var leikbannaður, og at ein skaði fór at halda Hans Fróða Hansen frá longu bussferðini.

Julian Johnsson var á miðvøllinum í 83 minuttir. Tá sigurin var vísur, varð Julian, sum hevði fingið gult kort, útskiftur.

Føroyski landsliðsmaðurin var – sum vanligt – við í nógvum. Tað var eftir, at Julian hevði roynt seg við skoti, at Sogndal fekk hol á. Sjey minuttir vóru farnir, tá Raufoss málverjin hálvbjargaði skotroyndini. Kristian Ystaas, sum avloysti Kurt Mørkøre í álopinum, var fyrstur á returinum.

Eftir tíggju minuttir stútaði Julian Johnsson hornasparksinnlegg dygst omanfyri Raufoss málið.

Sogndal hevði tak á spælinum mesta partin av tíðini. Tá ein tími var farin, staðfesti U-21 landsliðsmaðurin og vanligi álopsfelagin hjá Kurt Mørkøre, Tommy Øren, sigurin. Tað gjørdi hann eftir snarálop.

**jh**

Restorffs - fyri ein og hvønn tosta



# Vágoyggin varð hangandi

*FS Vágar helt fast um sessin í fyrstu deild, tá teir leygardagin bastu fuglfirðingum, men leingi stóð nógv á hjá heimaliðnum*

Jákup Mørk

**FS Vágar-ÍF 2-0 (0-0)**
FS Vágar vann dystin um upp-/niðurflyting samanlagt 4-2

Tað stóð nógv á hjá báðum pørtum, tá fuglfirðingar leygardagin vitjaðu í Sørvági. Seinni dysturin um upp- ella niðurflyting stóð á skránni, og eftir at hin fyrri endaði við javnleiki 2-2, var alt fullkomuliga opið, tá farið var á vøllin.

## Útivøllurin telur eyka

Heimaliðið hevði tó tann fyrimunin, at teir høvd skorað á útivølli, tí í mun til landskappingina telja hesa mál við í roknskapinum, tá samlaða úrslitið av dystinum skal gerast upp.

Hetta merkti, at fuglfirðingar skuldu skjóta mál, um teir skuldu hava nakran møguleika at tryggja sær uppflyting, men hetta sást tó ikki aftur á vøllinum.

Einamest tóktust gesirnir áhugaðir um at binda fyri í verjupartinum, fyri at lokka heimaliðið nakað niðan á vøllin, so rúmd skuldi verða til kontraálop.

Fyrsti partur av setninginum eydnaðist eisini, tí yvirhøvur vóru tað vágamenn, sum høvdu størra trýstið í dystinum. Trupulleikin hjá gestunum var tó, at tað aloftast var ov lítið bit í mótálopunum, og at vágaverjan tí ikki hevði stórvegis trupulleikar av hesum álopsroyndum.

## Mistu gyltan møguleika

Avgjørt størsta møguleikan í fyrra hálvleiki fingu vágamenn, tá teir fingu tillutað eitt heldur óneyðugt brotsspark, tó at dóminum einki bilti. Álopsleikari stóð við rygginum móti málinum, tá ÍF verjuleikari var áhaldsin og rendi mannin um koll, og so var einki at gera.

Erlin Joensen í málinum megnaði tó at verja fyri skotinum frá Birgiri Jørgensen, og so kundu trúføstu ÍF áskoðararnir framhaldandi syngja »Erling á landsliðið«.

## Óskipað

Av fuglfirðingunum mundu tað tó einamest vera Erling og so áskoðararnir, sum stóðu fyri bestu avrikunum. Úti á vøllinum var í øllum førum ikki nógv, sum bendi á, at talan var um eitt lið, sum ætlaði sær at spæla fyrstudeildarfótbólt komandi ár.

Nógvir ófantaligir nærdystir, óneyvar sendingar og lág leikferð eyðkendi dystin, og leingi var eisini líkt til, at talan skuldi gerast um ein málleysan javnleik. Kanska høvdu nervar og eitt langt kappingarár eisini sítt at siga fyri leikligu dygdina, men hinvegin førdi drúgva javnstøðan eisini við sær, at nervin alla tíðina var til staðar.

Um miðjan hálvleikin høvdu liðini bæði tó hvør sína vandamikla roynd, men meðan fuglfirðingar skutu við síðuna av úr góðari skotstøðu, skeyt Birgir beint á ÍF málverjan úr fimm metrum, og javnleikur tóktist gerast eitt alt meira sannlíkt úrslit.

Við einum av fáu væl spældu álopunum í dystinum, eydnaðist tó brádliga vágamonnum at beina mest sum allan iva til viks.

Tór-Ingar Akselsen, sum við sínum skjótleika mundi vera ein hin størsta hóttanin móti fuglfirðingunum, slapp oman at baklinjuni. Rimvydas Bakus fekk bóltin, uttan tó at hava nakra góða skotstøðu, men skilagott bíðaði hann við bóltinum, áðrenn hann rullaði út frá til Hannus Olsen, sum kom rennandi við fullari ferð. Við einum klokkureinum skotið av brotsteigarmarkinum sendi Hannus bóltin niður í handara málhorn, og so kundu vágamenn endiliga draga andan nakað léttari. Leikarar og viðhaldsfólk fagnaðust sjálvsagt um málið, meðan fuglfirðingar hinvegin lógu á vøllinum, iðrandi um, at mál teirra nú tóktist at vera gloppið.

## Satsaðu alt

At tað í seinastu minuttunum gjørdist til enn eitt vágamál var eisini væntandi, soleiðis sum dysturin nú gjørdist.

Fuglfirðingar tveittu alt fólkið fram í eini roynd at venda dystinum, og so kundu vágamenn dúva upp á kontrafótbólt.

Serliga líkaði hetta Tór-Ingari væl, tað var meira enn tí einu ferðina, at hann rann frá tunnu fuglfjarðarverjuni hesa løtuna.

Revsingin hjá ÍF fall eisini, tá Tór-Ingar slapp leysur í høgru. Hann helt frá verjuleikarunum, áðrenn hann sendi bóltin flatt inn undir málið, har Igoris Kirillovas við innaru síðuni kundi beina bóltin í netið.

1-0 ella 2-0 var fyri so vítt eisini fullkomuliga líka mikið hjá gestunum. Teir høvdu mist møguleikan fyri einum sessi í bestu deildini, og nú gongur so í minsta lagi eitt ár, áðrenn fuglfirðingar aftur eiga umboð á ovastu rók.

Drúgva kappingarár teirra gav einki úrslit í so máta.

Vágamenn bjargaðu sær hinvegin enn eitt ár í bestu deildini, og so fæst at síggja, um úrtøkan komandi ár verður betri, enn hon var hesuferð.



*Hannus Olsen átti málið, sum tryggjaði Vágoynni framhaldandi sess í bestu deildini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Alt at siga

*Liðskiparin hjá FS Vágum, Albert Ari Thomassen, helt eftir dystin, at sigurin móti ÍF bjargaði felagsliðnum í Vágunum*

Jákup Mørk

Tað skiltist á øllum brøgdum, at vágamenn vóru fegnir um sigurin á ÍF leygardagin.

Teir høvdu eisini alla orsøk at fegnast, tí við sigrinum megnaði FS Vágar eisini at røkka málinum, sum teir høvdu sett sær undan kappingarársbyrjan.

## Treyt fyri framtíðini

Tá segði Álvur Samuelsen, formaður í felagnum, at framtíðin hjá felagnum var tvinnað saman við, um liðið stóð seg í fyrstu deild, og hesum er liðskiparin als ikki ósamdur í.

- Sigurin í dag bjargaði lívinum hjá felagnum, heldur Ari fyri.

- Sjálvandi kann hetta ikki sigast við vissu, men tað rokni eg so við, men um hetta er veruleiki fær man tó ongantíð at vita.

Spurdur um hvørjar vónir hann hevði til komandi kappingarárið, segði liðformaðurin, at talan helst verður um enn eitt torført ár.



*Liðformaðurin á felagsliðnum úr Vágoynni er ikki í iva um, at sigurin leygardagin bjargaði felagsliðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Nú fari eg fyri fyrst at taka mær av løttum, men eg haldi meg tó longu nú kunna siga, at talan verður um eitt sera trupult ár hjá okkum. Tilgongdin av leikarum verður helst millum lítil og eingin. Onkrir av ungu leikarunum fara helst at mennast enn meira, men yvirhøvur er hópurin ov tunnur, og hevur eisini verið tað síðani summarsteðgin. Av spælarum, sum tá fóru, varð einamest tosað um skiftið hjá Darius, men hópur av øðrum spælarum flutti tá eisini úr felagnum, og hetta hevur eisini merkt venjinginga.

- Hetta merkti nevnliga, at kappingin um plássini gjørdist so at siga eingin, og tá so er, er sera torført at fáa spælararnir at geva seg nóg nógv, og hetta hevur eisini verið sjónligt, tá dystir verða leiktir, heldur liðformaðurin.

Hvsussu verður við øllum hesum, ber sjálvandi illa til at taka støðu um nú. At tað ikki altíð gongu sum gitt, er júst lidna kappingarár eitt talandi dømi um, so tað kann hóast alt verða, at talan hjá liðformanninum verður øðrvísi um eitt knapt ár ella so.